Stór kanning:

# Besta sjálvtøkuborðið

**Hvønn dag leita nógv sær oman í býin at eta ein góðan bita á døgurðatíð. Nógv er at velja ímillum, og góðskan og prísurin eru ymisk. Hetta er eitt gott høvi hjá øllum. Fólk sleppa frá at smyrja matpakka heimanífrá og kunnu í staðin slappa av á hugnaligum matstovum við einum góðum bita saman við starvsfeløgum, vinum ella hjúnafelagum.**

**Sosialurin hevur verið úti um seg á Havnar gøtum og kannað, hvussu ymisku sjálvtøkuborðini á middegi eru á matstovunum í býnum fyri at lýsa góðar og kanska minni góðar síður.**

*Samanskipað: Lív Højsted Horsdal og Inna Tørnroos*
*Myndir: Blaðfólk á Sosialinum og Jens Kristian Vang*







## Hotel Hafnia

**Prísur:** 98 kr fyri sjálvtøkuborð, frukt og køkur.

**Góðska:** Góð, smakkaði væl og fjølbroytt úrval av mati. Úrvalið av salati kundi kanska verið betri, og heitu kjøtbitarnir vóru eitt vet turrir. Uppsetingin av matinum var vøkur.

**Tænasta:** Vit vórðu væl móttikin. Tænarin visti ikki rættiliga rætta svarið, tá vit spurdu um okkurt, men var fryntligur og fór inn til kokkin at spyrja eftir svari.

**Umhvørvi:** Til bar at velja sær roykifrítt øki. Møblarnir vóru vanligir hotel møblar – ikki ov fínir, men heldur ikki ljótir. Hvítur dúkur var á borðinum, gott útsýni, ljóst og svalligt og góður tónleikur í bakgrundini.

**Pláss:** Vit fingu pláss beinanvegin – bert trý onnur vóru í allari matstovuni.

**Atkomumøguleikar fyri børn og rørslutarnað:** Ja, tey høvdu lyftu og barnastólar til taks.

**Ummæli:** ★★★★

## Hotel Tórshavn

**Prísur:** 79 kr fyri sjálvtøkuborð.

**Góðska:** Smakkaði væl. Maturin var heitur og soltin – serliga var fiskasúpanin sera góð, meðan búffurin tó ikki smakkaði av nógvum. Omaná fingu vit okkum te, men tað var ikki serliga heitt, men wienarbreyð á 12 kr smakkaði væl.

**Tænasta:** Vit funnu okkum tað seinasta borðið sjálvi, men annars vóru starvsfólkini fryntlig.

**Umhvørvi:** Tað sást sjónliga, at matstovan í løtuni er í umbygging. Borðið var reint, men undir var støv í hópatali – eisini undir sjálvtøkuborðinum. Eisini var tað heldur myrkt inni í hølinum.

**Pláss:** Nógv fólk, men fingu hóast tað pláss.

**Atkomumøguleikar fyri børn og rørslutarnað:** Lyfta er til taks, men í løtuni er ikki serliga barnavinarligt, nú umbyggingin er í gongd.

**Ummæli:** ★★

## Hotel Føroyar

**Prísur:** 140 kr fyri sjálvtøkuborð, frukt og køkur.

**Góðska:** Góð, fjølbroytt og øðrvísi. Serliga var salatið framúr.

**Tænasta:** Har var einki at finnast at; vit fingu svar á alt, vit spurdu um.

**Umhvørvi:** Gott pláss, møblarnir sera góðir, gott útsýni og svalligt.

**Pláss:** Vit fingu pláss beinanvegin, hóast nógv fólk vóru og ótu.

**Atkomumøguleikar fyri børn og rørslutarnað:** Barnastólar vóru til taks, og gott pláss til t.d. at koyra við barnavogni, men maturin var ikki barnavinaligur. Umstøðurnar fyri rørslutarnað vóru eisini góðar, og lyfta var til staðar.

**Ummæli:** ★★★★★